UTTAN ÚR HEIMI

## Steðgaðu tangaskipi

Donsku myndugleikarnir hava gjørt greitt, at teir vilja gera alt til tess at forða fyri einari oljudálkingarvanlukku sum teirri, ið hendi við tangaskipinum "Prestige", og tí er eftirlitið við tangaskipunum, sum sigla ígjøgnum tey donsku sundini hert munandi seinastu tveir mánaðarnar.

Fyrradagin gjørdi danska sjópverjan av at steðga einum tangaskipi, sum var á veg ímóti Stórabelti við 70.000 tonsum av olju í tangunum. Skipið fekk boð um at leggja stilt, eftir at loðsurin varnaðist, at róðurmaskinan virkaði ikki, sum hon skuldi. Síðani hevur skipið ligið fyri akkeri sunnan fyri Falster, meðan bíðað verður eftir, at róðurmaskinan verður umvæld.

Skipið, sum eitur "Kaptein Stankov", er skrásett í Liberia, men tað er eitt bretskt reiðarí, sum eigur tað. Skipið fermdi oljuna í Estlandi og skuldi til Antwerpen í Belgia við lastini.

## ES sigur nei

ES hevur nú gjørt greitt, at samveldið tekur ikki undir við amerikansku ætlanini at leypa á Irak.

Grikkaland hevur í løtuni formansskapin í ES, og grikski forsætisráðharrin, Costas Simitis, sigur, at eitt kríggj við Irak fer at gera Miðeystur enn óstøðugt, enn ókið longu er. Uttanríkisráðharri hansara, Georgios Papandreou, heldur, at tað er óneyðugt at tosa um kríggj, so leingi vápnaeftirlitsmenninir hjá ST eru í Irak, og hann leggur afturat, at krígshóttanin órógvar arbeiðið hjá eftirlitsmonnunum.

Franski uttanríkisráðharrin, Dominique Villipin, hevur boðað frá, at hann fer at leggja Irakkreppuna fyri uttanríkisráðharrafundin hjá ES í næstu viku. Franski ráðharrin hevur eisn og týski starvsbróður hansara, Joschka Fischer, gjørt greitt, at hann er ímóti kríggi við Irak.

# Ísraelskt statsherverk



Ein palestinskur handilsmaður framman fyri leivdunum av tí, sum var handil hansara.

**Ísraelskir gravkýr javnaðu 62 smáar handlar í palestinska býnum Nazlat við jørðina. Handlarnir vórðu bygdir uttan neyðug loyvi, siga ísraelsmenn. Búskaparligt kríggj, siga palestinar.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Fyrradagin javnaði ísraelski herurin 62 av teimum 170 smáhandlunum í palestinska býnum Nazlat á Vestara Áarbakka við jørðina. Handilsmenninir og nøkur ísraelsfólk og útlendingar, sum virka fyri friði, royndu at steðga oyðileggingini, men ísraelsku hermenninir róku tey burtur við táragassi og gummikúlum.

Teir smáu handlarnir eru miðdepilin á marknaðinum í Nazlat, og tey flestu av teimum 2500, sum búgva í býnum, hava í fleiri ár livað av tí, sum handlarnir góvu. Men nú eru 62 av teimum 170 handlunum javnaðir við jørðina. Eigararnir fingu fyri tveimum vikum síðani at vita, at handlarnir vórðu bygdir uttan tey neyðugu loyvini, og at teir skuldu takast niður.

Eygleiðarar siga, at ísraelsku myndugleikarnir hava uttan iva rætt í, at tey neyðugu loyvini vóru ikki fingin til vega sambært ísraelskari lóg, men víst verður á, at Nizlat er í einum øki, sum sambært altjóða rætti er undir ólógligari herseting, og harafturat kemur, at royndirnar vísa, at palestinar fáa ikki byggiloyvi, tá teir søkja um tað.

Palestinski ráðharrin, Saeb Erekat, sigur, at tilburðurin í Nizlat er statsherverk og búskaparligt kríggj.

# Pan Fish ávarar ímóti sær sjálvum

**Stýrið í tí endurskipaða alifelagnum ávarar fólk ímóti at seta pengar í felagið, tí vandin fyri at missa pengarnar er stórur.**

ÍLØGUR
*Árni Joensen:*

Stóra norska alifelagið Pan Fish, sum varð endurskipað herfyri, skal hava upp íment 200 milliónum krónum í nýggjum partapeningi, men samstundis sum stýrið biður um nýggjan partapening, ávarar tað fólk ímóti at seta pengar í felagið.

Tá tilboðstilfarið hjá stýrinum varð almannakunngjørt fyrradagin, gjørdi stýrið samstundis vart við, at sjálvt um felagið hevur endurfíggjað sína skuld, kann tað væl henda, at fíggjarstøðan fer at versna aftur. Grundgevingarnar eru lágur laksaprísur, sjúkur og tann sterka norska krónan. Tí eiga tey, sum velja at seta pengar í felagið, at gera sær greitt, at íløgan er rættiliga ótrygg, og at vandin fyri at missa pengarnar tí er stórur.

Tekningarvirðið á einum partabrævi í Pan Fish er 50 norsk oyru, og freistin at seta pengar í felagið er úti tann 4. februar.

# Hann líkist Christer Pettersson

**Suðurafrikanski agenturin, sum nú verður knýttur at morðinum á Olof Palme, sigst líkjast Christer Pettersson, sum varð ákærdur fyri morðið, men fríkendur.**

PALME-MORÐIÐ
*Árni Joensen:*

Tað var Lisbeth Palme, kona svenska forsætisráðharran, sum segði seg kenna Christer Pettersson aftur sum mannin, ið hevði skotið mann sín tann 28. februar í 1986. Hann varð eisini álærdur fyri morðið, men varð fríkendur í rættinum.

Nú hevur navni hansara, tíðindamaðurin Christer L. Pettersson, sæð eina mynd av tí suðurafrikanska agentinum, sum er settur í samband við morðið, og tíðindamaðurin vil vera við, at tann suðurafrikanski maðurin líkist Christer Pettersson.

Tann ókendi maðurin var agentur hjá apartheid-stýrinum í Suðurafrika og stríddist ímóti viðhaldsfólki hjá svarta frælsisfelagsskapinum ANC. Ein tann týdningarmesti stuðulin hjá ANC um tað mundið var júst Olof Palme.

Sambært svenska blaðnum Aftonbladet kom suðurafrikanski agenturin til Stockholm tann 27. februar í 1986. Hann búði á Hotel Wellington. Dagin eftir morðið, tann 1. mars, fór hann úr Svøríki. Hann hevði suðurafrikanskt pass, og alt hetta kann skjalprógvast, skrivar eitt annað svenskt blað, Dagens Nyjeter. Í dag býr agenturin í einum øðrum landi, og hann er ikki longur á lønarlistanum hjá suðurafrikanska statinum.

Fyrrverandi ovastin í svensku kriminalløgregluni, Tommy Lindstrøm, sigur, at hann hevur størri álit á hesari frágreiðingini enn einari frágreiðing, sum eisini tengdi Suðurafrika at Palme-morðinum. Ta ferðina var talan um suðurafrikansku løgregluna, men hesaferð er talan um herleiðsluna, og tað heldur Tommy Lindstrøm vera meiri sannlíkt.

– Upplýsingarnar siga, at drápsmaðurin var ikki drápsmaður í sjálvum sær, men ein hermaður, sum gjørdi eftir boðum, sigur fyrrverandi kriminalovastin.

Svenska løgrglan heldur harafturímóti lítið um tær nýggju upplýsingarnar.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Páll Poulsen**
Syðrugøta

andaðist 21. januar, 66 ára gamal.

*Familjunnar vegna*
**Margith, Andreas og Conny**

†

Tað er við sorg vit boða frá, at okkara høgt elskaði sonur, pápi, beiggi, svágur og pápabeiggi

**Gudmund Lindenskov Joensen,**
**Tórshavn, búsitandi í Nólsoy**

andaðist 20. januar, 34 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 24. januar kl 12:30

*Fyri tey avvarðandi*
**Rannvá og Tummas, lítla Rannvá, Kathrina, Jógvan Edvard og Hanna**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina gáva til lítlu Rannvá á konto í Føroya Banka 512.573.3



# Fólkaflokkurin og Sambandið tosað um samstarv

**Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava tosað saman um samgongusamstarv um vikuskiftið**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin tosaðu um samgongusamstarv um vikuskiftið, og hetta er ikki fyrstu ferð, at Fólkaflokkurin roynir hetta, sigur formaður Javnaðarfloksins.*

*Mynd: Savnsmynd*

Líkt er til, at ikki alt er so gott millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin í samgonguni, eftir at Tjóðveldisflokkurin ætlaði at atkvøða fyri misáliti móti Jørgen Niclasen, fyrrverandi landsstýrismanni.

Eftir hvat Sosialurin skilir, so var fundur millum umboð fyri teir báðar flokkarnar leygarkvøldið. Fundurin varð róptur fyri at vera óformellur, men tosað hevur eftir øllum at døma verið um eitt møguligt samgongusamstarv.

Einki úrslit spurdist burturúr, og tað skal hava verið spurningurin um løgmansembætið, ið hevur verið avgerandi.

Hesin sami spurningurin var orsøkin til, at tað slitnaði millum partarnar, tá partarnir royndut at semjast um eina samgongu saman við Javnaðarflokkinum eftir valið í apríl.

Síðani Jørgen Niclasen misti sessin hjá sær orsaka av trýstið frá m.a. Tjóðveldisflokkinum hevur stevið í samgonguni ikki verið tað besta, og støðugt hava tíðindi um minni gott samstarv verið frammi sum tíðindi og leysasøgur.

Tískil er tað heldur ikki so langt av leið, at Fólkaflokkurin kunnar seg um, hvørjar samstarvsmøguleikar flokkurin hevur.

### Eingin vil tosa

Sosialurin hevur dúgliga roynt at fingið tíðindini váttaði, men hetta hevur ikki borið til.

Eingin vil alment siga, at talan vóru um samráðingar. Eingin teirra, ið sigst hava verið við til fundin, vil gera nakra serliga viðmerking.

Alfred Olsen, næstformaður í Sambandsflokkinum, sigur, at ein tílík hending sum tá Jørgen Niclasen fór úr starvi gevur møguleikan til prát, og umboð fyri Sambandsflokkin hava prátað nógv við Fólkaflokkin, men hann avsannar, at talan hava verið um nakrar samráðingar.

Formaður fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum,Óli Breckmann, vil hvørki vátta ella avsanna, at fólk úr flokkunum báðum hava tosað saman, men so leingi, teir eru í einari samgongu, gera teir einki við at tingast við annan flokk um møguligt samstarv, sigur hann.

Á tingfundinum týsdagin gekk prátið heitt um evnið.

Formaður Tjóðveldisfloksins segði seg eisini hava hoyrt leysasøgurnar, men hann tók tað róliga. Hann sigur, at Tjóðveldisflokkurin heldur seg til gjørdar avtalur.

### Sama støða

Formaður fyri Javnaðarflokkin sigur seg kenna hesa støðuna aftur. Hetta váttar, at hetta ikki er fyrstu ferð, at Fólkaflokkurin ger sovorðið.

– Hasar søgurnar eru eisini komnar fyri mítt oyra. Hetta er fyri sovítt sama støðu sum í síðsta valskeiði: Hvørja ferð størri trupulleikar stungu seg upp í samgonguni, so var Fólkaflokkurin skjótur at tosa við okkum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at Fólkaflokkurin ger hetta fyri at tryggja seg sjálvan, og hetta gera hann best við teimum átta hjá Sambandsflokkinum, soleiðis at roknistykki gongur upp.

– Hetta er taktikkur. Teir vilja gera mótpartin moyran, men mítt ráð til Sambandsflokkin má vera, at tey ikki skulu lata seg brúka av Fólkaflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Føroyskar telefonir í Afrika

**Iridium tænastan hjá Føroya Tele hevur fingið kundar í Togo og Sierra Leona**

SAMSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Iridium skipanin virkar á tann hátt, at ringjast kann við somu telefon allastaðni í heiminum umvegis fylgisvein til allar aðrar telefonir.

Tað er mest skip, sum gera sær dælt av hesari skipanini. Har hvørki NMT ella UHF røkkur virkar Iridium.

Onkur hevur kanska lagt til merkis, at fyri tíðina eru nakrar lýsingar fyri Iridium. Júst hetta sama Iridium hevur verið at sæð í lýsingum í bløðum fyri nøkrum árum síðani, og nú er aftur okkurt at frætta um Iridium.

Talan er um ein fylgisveinatelefonskipan. Eftir at Iridium fór av knóranum, varð fyritøkan endurreist við nýggjum eigarum fyri tveimum árum síðani.

Føroya Tele er eitt av umboðnum fyri Iridium í Føroyum.

Magni Olsen, sum starvast deildini fyri Strategi og virkismenning hjá Føroya Tele, sigur, at Føroya Tele metti hetta vera eitt spennandi nýtt øki, og teir eru av álvara farnir undir at royna at reka kommersielt virksemi eftir eina royndartíð.

### Í Afrika

Magni Olsen upplýsir, at tey í løtuni koyra eitt pilotprosjekt í Afrika.

– Vit royna eina avrokningarskipan á nøkrum skipum í Suðurafrika saman við Iridium, har vit eisini lána útgerð til skipini, men tey gjalda fyri ta tíð, tey tosa, sigur Magni Olsen.

Hesi bæði skipini eru Doulos í Togo og Anastasis í Sierra Leona. Hesi bæði skipini eru skip hjá kristnum felagsskapum, sum sigla nógv runt millum lond. Dulos hoyrir til sama reiðarí sum Logos II, ið var í Føroyum í 2001.

Við Tel-Log, sum avrokningarskipanin hjá Iridium eitur, kann hvør á skipinum hava sítt egna loyniltal sum frámerki, og harvið verður lættari at gera upp, hvør skal gjalda hvat fyri at ringja.

– Avrokningarskipanin er nógv betri enn við øðrum skipanum, og tað er einki fyri at halda skil á hjá reiðaríinum og manning, sigur Magni Olsen.

### Bíligt

Samanborið við eitt nú Immarsat er Iridium skipanin rættiliga bílig. Sjálvar telefonirnar eru kostnaðarmiklar – prísurin liggur um 20.000 kr. Gjaldið fyri hvønn mánað er 148 kr.

Kostnaðurin fyri at ringja er 4,50 kr./min til aðrar Iridium telefonir allar tíðir á døgninum. Verður ringt til eina "vanliga" telefon, skalt tú av 8,43 kr/min. Samanbera vit hetta við, at tað eitt nú kostar tólv krónur at ringja til Brasilia úr Føroyum, so er hetta ikki so øgiliga nógv. Góðskan er eins og við øðrum fylgisveinasambondum við eitt sindur av seinkan.

Iridium bjóðar tvey sløg av telefonum. Eitt er ein fartelefon, sum ikki er so nógv størri enn vanligar GSM fartelefonir. Hin er ein telefon at seta fast í einum stað, og hin minnir nógv um nakrar av teimum fyrstu NMT telefonum, ið komu til Føroya fyrst í nítiárunum.

Skipanin rúmar eisini dataflutningi og smærri tekstboðum.

# Nýggj telefonbók

**1. mars verður nýggja telefonbókin borin út**

SAMSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Í løtuni verður arbeitt av øllum alvi við at gera nýggju telefonbókina lidna. Telefonbókin 2003 verður eftir ætlan borin út 1. mars og næstu dagarnar aftaná.

Tað er Teleforlagið, sum er partur av Føroya Tele, ið stendur fyri at samskipa útgávuna, men útgevari er móðirfelagið.

Jens Pauli G. Nolsøe, leiðari fyri Teleforlagið, sigur, at allir fastnetfelagar hjá Føroya Tele og Kall fáa bókina ókeypis. Onnur hava so møguleikan at keypa sær eina fyri hálvtrýss krónur.

Nýggja telefonbókin verður prentað í 33.000 eintøkum. Bókin fer at líkjast teimum undanfarnu við gulum síðum, kortum og øðrum.

### Eingin dós

Teir felagar, ið tað ber til at leita fram í nýggju telefonbókini, eru allir fastnetkundarnir í Føroyum og fartelefon kundar hjá Føroya Tele.

Fólkini við dós – fartelefon kundar hjá Kall – fáa í hesum umfarinum ikki møguleikan at síggja sítt egna nummar í telefonbókini.

Bjarni A. Bjarnason, stjóri fyri Kall, sigur, at evstamark til at sleppa við í telefonbókina var í desember, og tá vóru teir ikki klárir við teirr nummørum.

Kall er í holt við at gera eina elektroniska telefonbók við teirra nummørum. Hendan verður klár 1. februar, og Bjarni A. Bjarnason upplýsir, at teir fara at lata hesa telefonbók til nummar.fo og finn.fo.